# Holst skoraði ímóti Brøndby

Føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst dugir at gera mál. Hann skoraði mál í ársins fyrsta venjingardysti hjá Lyngby, og um vikuskiftið skoraði hann eisini í tí næsta. Hesaferð spældi Lyngby ímóti Brøndby, og úrslitið gjørdist 2-2. Holst javnaði til 1-1 beint eftir hálvleikssteðgin. Hin føroyski landsliðsspælarin í Lyngby, Tem Hansen, spældi eisini við hendan dystin.



# Slagið skal standa við Margáir

Tá ið fótbólturin aftur fer á rull í vár, verður tað ikki á navnleysum vølli í Streymnesi, at EB/Streymur fer at dystast ímóti hinum liðunum. Vøllurin var liðugur í 2007, men saknur hevur verið í einum navni til hann. Men nú er gjørt av, at vøllurin skal eita Vøllurin við Margáir, sigur Sunda Kommuna á síni heimasíðu. Staðarnavnið Margáir hevur sín uppruna í teimum mongu áunum, sum renna oman í Stórá, beint við vøllin.

Stjørnan-Kyndil 35-25 (18-15):

# Stjørnan buldrar víðari

**Hóast verjuparturin ikki var so sannførandi hesaferð, so skoraði Stjørnan somikið væl, at sigurin á Kyndli ongan tíð var í vanda**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í seinastu dystunum móti Neistanum og VB hevur Stjørnan veruliga havt stórspælið frammi.

Tí var ikki væntandi, at Kyndil kundi gera nakað sum helst við oddaliðið, og við einum tapi upp á 10 mál var tann spádómurin so ikki gjørdur fyri skommum.

Men Kyndil royndi tó at spæla sín møguleika. Stjørnan var kanska ikki heilt so væl gearað hesaferð, og fyri steðgin megnaði Kyndil so hampuliga væl at fylgja við.

Og hóast tað alla tíðina so tungt út hjá gestunum, so var tað kortini ikki fyrr enn seinastu løtuna, at tað veruliga skrædnaði millum liðini. Ikki minst tí spælararnir hjá Stjørnuni eru somikið væl fyri kropsliga, og tí veruliga kundu seta trumf á seinastu løtuna, tá Kyndil varð runnið niður og norð.

Enn sum áður er Stjørnan greitt á odda í Sunsetkappingini, og tann støðan verður so ikki broytt í endaspælinum. Har er einasti spurningurin, hvør verður mótstøðan í finaluni.

Kyndil tykist hinvegin hava rokkið fremsta málinum um at halda sær burturi frá botninum. Og í so máta høvdu tær væl ráð at liva við tapinum í Klaksvík.

## FAKTA

**Stjørnan-Kyndil 35-25 (18-15)**
10 min: 7-6
20 min: 12-11
40 min: 22-18
50 min: 27-23
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Durita Christophersen 10, Simona Petersen 10, Una Olsen 5, Durita Ljósstein 4, Edith Hansen 2, Anna Kristina Samson 2, Hann Mikkelsen 1, Bára Skaale Klakstein 1
**Kyndil:** Jackiln Durhuus 8(3), Randi Wardum 6(2), Lina Andriulyte 5, Tordis Tróndarson 2, Barbara Egilstrøð 1, Ása Apol 1, Eyðritt Andreasen 1, Mia Káradóttir 1
**Brotskøst:** Stjørnan 1, Kyndil 5
**Útvísingar:** Stjørnan 3, Kyndil 5
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen

VÍF-StÍF 20-30 (11-16):

# Spæla sum meistarar

**StÍF sýndi mest sum ræðandi styrki, tá teir í dag vundu burtur úr VÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kanska er einasta loysnin at mansverja samfullar seks útispælarar hjá StÍF. Í øllum førum sýndu strandingarnir sunnudagin, at teir hava so nógv flestar streingir av øllum.

Tí hóast unga VÍF-liðið fleiri ferðir spruttaði nakað, so megnaðu teir als ikki at halda sama støðuga støði, sum gestirnir gjørdu.

### Breið hóttan

Snøgt sagt, so var tað alla tíðina onkur spælari – og oftast fleiri – sum vóru til reiðar at taka ábyrgd á liðnum hjá StÍF.

Í álopinum hevur stórur partur av spælinum í ár snarað um Danni Syhler og David Edvardsen, og hesir sýndu sanniliga sítt virði. Ikki minst var tað sjónligt, tá VÍF tað einu ferðina royndi at skerma Syhler úr spælinum við eini offensivari 5-1 verju. Ístaðin fingu teir bara ein krossandi Edvardsen, sum tríggjar ferðir á rað bankaði bóltin í meskarnar, og so var tað hugskotið líkasum slept.

Men eisini hinir á liðnum sýndu dygdir, sum samanlagt gera StÍF til vandamest liðið í deildini. Justinussenbeiggjarnir hava skotstyrki, sum fáir aðrir í landinum. Á veinginum kundi tað nærum gera tað sama, hvørjar spælarar StÍF nýtti, tí teir skoraðu kortini. Og í strikuspælinum hevur liðið eisini frægar spælarar, sum eisini fingu pláss, tá VÍF verjan noyddist at hugsa bæði breitt og djúpt.

Nú stendur VÍF miðskeiðis í einum ættarliðsskifti. Og tí er ein stórsigur í Vestmanna ikki sama valdsdemonstratión, sum tað var fyri nøkrum árum síðani. Men kortini hava teir gulu somikið av kvaliteti, at tað skal eitt serstakliga gott lið til fyri at geva ein slíkan umgang.



*André F. Danielsen og StÍF eru flúgvandi. Hesa ferð var tað VÍF, sum í egnari høll fekk av at vita*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Spruttaðu viðhvørt

Tað var tó ikki soleiðis, at vestmenningar vóru fullkomuliga hjálparsleysir.

Við Agnari Joensen á odda fylgdu vertirnir væl við fyrstu løtuna av dystinum sunnudagin, men breiddin hjá StÍF kom teimum í serstakliga stóran mun tilgóðar, tá vestmenningar ikki megnaðu at halda ferðini uppi allan vegin.

Hetta gav at bíta miðskeiðis í fyrra hálvleiki, tá 6-7 gjørdist til 6-13, og aftur í seinna hálvleiki var sama skili. Tá hevði VÍF annars eftir málleysa undirtalsstøðu strítt seg til trý mál á rað og minkað munin niður í 17-20. Men lítli spenningurin, sum nú var í, hvarv sum døgg fyri sól, tá StÍF vann næstu løtuna 8-1. Og so var góða arbeiðið hjá teimum gulu at kalla burturspilt.

alan var av, kundu grunda um, hvat skal til, um StÍF skal basast. Ja. Kanska ein seks-dupult mansverja er svarið.

## FAKTA

**VÍF-StÍF 20-30 (11-16)**
10 min: 4-3
20 min: 6-11
40 min: 15-20
50 min: 17-25
**Málskjúttar**
**VÍF:** Agnar Joensen 4(1), Rúni Joensen 4, Daniel Rapa 4(1), Fríðbjørn Seloy 2, Niels Andreasen 2, Bjarti Hansen 2, Dávur Magnussen 1, Joen P. Høgnesen 1
**StÍF:** David Edvardsen 6, Rúni Niclasen 4, Leivur Justinussen 3(1), Jón Rasmussen 3, Bárður Danielsen 3, Danni Syhler 3, Borgar Danielsen 3, André F. Danielsen 3, Sveinur Justinussen 2(1)
**Brotskøst:** VÍF 3, StÍF 3
**Útvísingar:** VÍF 3, StÍF 4
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr